# Tenorsangur við guitarspæli

**Tenorsangarin Peter Hentze Niclasen og guitarleikarin Ólavur Jakobsen fara í hesi vikuni at hava tvær konsertir við føroyskum sangum og sangum eftir m.a. Dowland, Britten og Donizetti**



*Peter Hentze Niclasen og Ólavur Jakobsen hava klassiska konsert við guitara og sangi í Ribarhúsi og Mariukirkjuni*

SANGUR

Guitar og sangur er ein samanseting, ið ikki er so ofta at hoyra í føroyska klassiskatónleika-umhvørvinum. Enn meira forkunnugt er, at teir eisini fara at framføra okkurt nýgjørt fyri guitar og sang. Talan er um sanglag skrivað av Bjarna Restorff. Bjarni hevur sett lag til yrking eftir Carl Jóhan Jensen, og verður tað her framført á fyrsta sinni.

Ólavur Jakobsen hevur skipað føroysk løg av nýggjum til guitar og sang. Her er serliga talan um sangir eftir Regin Dahl, eins og Hans Jacob Højgaard eisini er umboðaður.

Teir fara víða um í konsertini – bæði landafrøðiliga og í tíð. Har verða verk eftir enska renæssencutónaskaldið John Dowland (1563-1626), sum upprunaliga skrivaði sín tónleik til lut. Somuleiðis verða sungnir fólka-sangir, sum enska tónaskaldið Benjamin Britten (1913-1976) hevur lag til rættis. Okkurt kent frá italskum bel-canto operum verður at hoyra, umframt at Ólavur fer at framføra solotónar eftir Johann Sebastian Bach á guitara.

Peter Hentze Niclasen er tenorsangari og syngur við í m.ø. Tórshavnar Manskóri og Tarira. Hann var næmingur á Íslendska sangskúlanum – Føroya deild, ið virkaði í Føroyum fyri nøkrum árum síðani, og hevur hann leitað sær lærdóm hjá m.ø. Garðar Cortes og Óløf K. Harðardóttir. Eisini hevur hann í styttri tíðarskeið fingið sangundirvísing í Keypmannahavn og Aberdeen. Umframt solistuppgávur í kórum, hevur hann eisini sungið við á fleiri fløguútgávum.

Ólavur Jakobsen er av Kamarinum í Havn. Hann byrjaði sum smádrongur at spæla gittara. Hann var so at siga sjálvlærdur innan klassiskt guitarspæl, tá ið hann kom gjøgnum nálareygað á tónlistarskúlanum í Keypmannahavn. Hann tók diplomprógv haðani í 1995. Lærari hansara var Ingolf Olsen. Ólavur var á árs-skeiði í 1993/94 í Frankaríki. Hann var næmingur hjá Roland Dyens, núverandi professara á Conservatoire Superieur í Paris.

Konsertirnar eru:

Hóskvøldið 10. apríl kl. 20 í Ribarhúsi í Fuglafirði.

Sunnukvøldið 13. apríl kl. 19:30 í Mariu Kirkjuni í Havn.

Ókeypis atgongd er til konsertina í Mariu kirkjuni í Tórshavn, atgongumerki fyri 80 krónur fáast við dyrnar í Ribarhúsi í Fuglafirði. Skúlanæmingar hava ókeypis atgongd.

# Føroysk mentanarveitsla á Kjarvalsstøðum



**Í fagrasta veðri leygardagin 5. apríl, var vakra listasavnið Kjarvalsstaðir í Reykjavík karmur um stórfingna føroyska mentanarveitslu í samband við at Mikines framsýningin lat aftur hetta vikuskiftið**





FRAMSÝNING

*Tíðindaskriv*

Tað var Reykjavíkar Býráð og listasavnið Kjarvalsstaðir sum høvdu tikið stig til tiltakið og í samstarvi við Útnorðurráðið, Føroyingafelagið og Sendistovu Føroya, varð ein fjølbroytt skrá sett saman fyri allan seinnapartin.

Hópur av fólki var komið á Kjarvalsstaðir hendan dagin og tiltakið byrjaði við at Aðalsteinn Ingólfsson, rithøvundi av stóru Mikines bókini, helt fyrilestur um listamannin og greiddi frá listaverkum hansara. Eftir hetta var ymiskt fyri børnini – dukkusjónleikur, spøl og kapping, har Mikines-myndirnar vóru partur av spælinum.

Smyril Line, Atlantsflog saman við Flugfelag Islands og Færeyjaferðir vóru umboðaði við fólki, ið góvu faldarar og kunning um Føroyar sum ferðamál og hópur av fólki vísti hesum áhuga. Føroyska klædnafyritøkan Sirri var somuleiðis umboðað við modellum, sum gingu runt og sýndu føroysk klædnapløgg fram og handaðu faldarar til gestirnar.

Kl. 16 framførdi føroyska trio'in við Leivi Thomsen, Bjarka Meitil og Katrinu Petersen hugtakandi fólkaløg, avbera vakurt borin fram av Katrinu. Eftir hetta var farið upp á gólv. Heini Mohr, Sámal Júst Ziska Dahl og Leivur Jacobsen, allir royndir og dugnaligir kvøðarir úr Klaksvíkar Dansifelag, vóru komnir at skipa dansin, sum gekk væl og tað sást at nógv fólk høvdu hug at koma uppí.

Eftir hetta var borðreitt við føroyskum mati og bjóri og Gunvør Balle, sendikvinna, greiddi frá hvussu vit hagreiða tjóðarrættir okkara. Sera stórur áhugi var millum íslendingar, og sjálvsagt eisini føroyingarnar, at smakka ein bita av turra tvøstinum og spikinum, skerpikjøtinum og skinsakjøtinum.

Tá talt var upp eftir at síðstu gestirnir vóru farnir kl. 18.00, varð greitt, at 1600 fólk høvdu vitjað Kjarvalsstaðir hendan dagin og talan var nærum um met fyri savnið. Fyrireikararnir vóru sjálvsagt sera væl nøgdir við teir nøgvu gestirnar og kundu staðfesta, at hetta ber boð um stóran áhuga fyri føroyskari mentan í Íslandi.